ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 31. juli 2009

# Siggi út og Egil inn

**Lokala hetjan vigaði tyngri enn dýrtkeyptu venjararnir, og tí varð Egil á Bø biðin um at koma aftur og Sigfríður Clementsen og Magni Mohr bidnir um at fara**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Myndin frá steypafinaluni á ólavsøku talar fyri seg. Í EB/Streymi vóru tað alt annað enn fegin um, at liðformaðurin og ímyndin av EB/Streymi, Egil á Bø, var settur til viks og valdi at gevast.

Hetta var óskiljandi og bar ikki til. Maðurin, sum hevur verið ímyndin av serstakliga væleydnaðu samanleggingini í Sundalagnum, var vekk. Burtur var eisini góði andin, sum hevur valdað kring felagið síðani samanleggingina í 1993.

Fólkið tosaði í krókunum. Hetta var ikki gott, tað sum hendi. Spælið var heldur ikki eins gott og tað hevði verið, og onkursvegna sást tað aftur á vøllinum, at leikararnir ikki trivust í sama mun og áður.

Neyvan vóru tað vantandi kakurnar eftir venjing, sum gjørdu hetta, men hesar vóru eisini tiknar av skránni, tá profesionella venjaraparið kom norður og gjørdi EB/Streym til Føroyameistarar og steypavinnarar.

Nevndin stuðlaði venjarunum

Hóast úrslitini ikki hava verið eftir vild í longri tíð, og ónøgdin millum viðhaldsfólkini er vaksin so líðandi, valdi nevndin at stuðla og standa saman um venjaraparið til tað síðsta.

Steypafinalan kundi bjarga árinum, men tá henda eisini glapp, samstundis sum, at mister EB/Streymur ikki var tøkur longur, valdi nevndin at handla.

– Vit hava kunnað leikararnar um tað, ið er farið fram, og leikararnir stuðla okkum í okkara avgerð, segði Rólant Højsted við Sosialin í gjárkvøldið.

Somu leikarar stuðlaðu eisini Egil á Bø undir sjálvari finaluni. Tá Arnbjørn Hansen minkaði um munin stutt fyri leiklok, rann hann út til viðhaldsfólkini og lyfti blusuna upp. Boðskapurin var ikki til at fara skeivur av.

Men hóast keðiliga stemningin seinastu tíðina, ger formaðurin í EB/Streymi, Rólant Højsted, greitt, at teir eru ógvuliga fegnir um samstarvið við Sigfríða Clementsen og Magna Mohr.

– Men sum støðan er í løtuni, mettu vit hetta vera rætta avgerðin at taka, sigur hann.



**Arnbjørn Hansen vísti sín dygga stuðul til Egil á Bø, tá hann skoraði í steypafinaluni á ólavsøku**
Mynd: Sofus D. Johannesen

# Heðin Askham er nýggi venjarin

**Tá leikararnir í EB/Streymi fara á fund við Margáir í kvøld, verður kunngjørt fyri teimum, at Heðin Askham skal venja teir, tað ið eftir er av árinum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Formaðurin í EB/Streymi, Rólant Højsted, vil tó ikki vátta, at talan er um Heðin Askham.

– Venjarin er funnin og vit kunngera helst í kvøld ella í morgINárini, hvør hesin er, segði hann við Sosialin í morgun. Rólant Højsted greiðir frá, at tey ynskja sjálvi at kunna leikararnar um, hvør nýggi maðurin við róðrið er.

Sosialurin fekk tó at vita so mikið sum, at nýggi venjarin kemur til landið í kvøld, og at hesin kemur at stýra liðnum, tá EB/Streymur tekur í móti KÍ sunnudagin.

### Heðin kemur úr Íslandi

Eitt av flogførunum, sum setur seg á breytini í Sørvági í kvøld, kemur úr Íslandi.

Sosialurin hevur verið í samband við Heðin Askham, eftir at tað gjørdist greitt, at EB/Streymur leitaði eftir nýggjum venjara. Hann var í Íslandi og vildi einki siga tá.

### Heðin er einasta boðið

Umframt greiðu ábendingarnar, Sosialurin hevur fingið, eru eisini aðrir faktorar, ið tala fyri, at tað verður Heðin Askham. Hann er tøkur á marknaðinum og hevur neyðugu útbúgvingina, sum krevst fyri at leiða eitt lið í Vodafonedeildini.

Harumframt hevur hann eisini ógvuliga góð úrslit at vísa á, og úrslit er júst tað, EB/Streymur vantar mest í løtuni.


**Á fundi í gjár vóru leikararnir kunnaðir um uppsøgnina av Sigfríða Clementsen og Magna Mohr, og á fundi í kvøld fáa teir at vita, at Heðin Askham verður teirra nýggi venjari**
Mynd: Sofus D. Johannesen

Seinastu tvey árini hevur Heðin Askham verið venjari hjá U21-landsliðnum, sum hevur staðið seg væl. Besta úrslitið fekk hann, tá U21-landsliðið vann 1-0 á Russlandi. Harumframt hevur hann eisini havt ábyrgdina av A-landsliðnum ein dyst, tá eingin landsliðsvenjari var settur. Hetta var í vár og tá eydnaðist tað honum at vinna á Íslandi í venjingardysti, og harvið er hann einasti venjarin, ið einans hevur vunnið við A-landsliðnum.

Í fjør var Heðin Askham venjari hjá B36. Her varð avrikið mett at vera meiri enn góðkent. B36 var millum positivu innsløgini í landskappingini, og lagt var eisini upp til, at samstarvið millum felagið og venjarin skuldi halda áfram, men hetta var av ongum, tá trupulleikar vóru við sáttmálaviðurskiftunum.

### Kunngjørt í kvøld

Tískil er tað ein maður við góðari útbúgving og góðum úrslitum, ið nevndin í EB/Streymi á fundi í kvøld presenterar fyri leikarum sínum.